


## Niels Norðberg Petersen • 40 ár • Timburmaður

Lýs teg sjálvan við trimum orðum:
Huff huff, tað verður ringt. Eg haldi eg eri arbeiðs-samur, eg veit ikki hvat meir... hjálpsamur kanska...og vinarligur

Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast:
Eg brúki "Hygg her" allatíðina

Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?
Tað er útstrálingin. Tað er ikki so nógv útsjóndin, men útstrálingin hevur alt at siga

Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?
Eg brúki fimm minuttir at vakna í.

Hvat stressar teg?
Eg eri forfærdiliga ringur at stressa... Men eg kann gerast illur inn á stríðið, sum øll vilja vera við er millum vágbingar og tvøramenn, tí í veruleikanum er einki stríð

Hvat gleðir teg?
Tað er heilt avgjørt børnini

Nær feldi tú seinast eitt tár?
Puha! Tað má fara at vera fyri einum ári síðan, tá ein barndómsvinur hjá mær doyði og fór til gravar. Tað var ómetaliga hart...

Hvat var títt seinasta ynski, sum varð uppfylt?
Ja tað seinasta ynskið... Eg veit satt at siga ikki, hvat tað hevur verið, so tað fái eg ikki svarað

Hvat hevur tú í lummunum beint nú?
Eg havi so nógvar lummar, men tað má nokk fara at vera skrúvur og seym, sum flestu timburmenn hava

Hvat er besta uppfinning?
Uha! Tú tosar altíð um, hvussu fantastisk summi ting er, men so er tað bara hvat...
Eg veit ikki, hvat tað skuldi verið, men lat meg siga lasarin, tí hann ger arbeiðið so nógv léttari, og tú fært møguleika at arbeiða einsamallur

Nær flutti tú heimanífrá, saman við hvørjum
Eg flutti fyrstu ferð heimanifrá, tá eg var eini 20 ár, og tað hevur verið miðskeiðis í 80´unum

Hvat kostar ein vanlig pera til forlyktirnar á einum bili á Shell í Trongisvági?
Uha, kostar hon ikki eini 87 krónur?
Niels, tú ert ikki heilt av leið. Hon kostar 95 krónur hjá Mogens í Trongisvági

Tobbi og Høgni Hoydal hava verið í opnum persónstríði í ein góðan mánað. Minnist tú hvat stríðið byrjaði við?
Jú tað átti eg at vita, tí eg havi fylgt við. Tað byrjaði við at Tobbi skrivaði eitt lesarabræv um, at Høgni ikki segði sannleikan í samband við eitt uppskot um skrásett parlag, sum Jógvan við Keldu ikki ætlaði at leggja fyri tingið..

Vit eru imponeraði Niels, tí vit hava langt síðan mist tráðin í málinum...

Títt besta heimaráð?
Oyjússur tað veit eg ikki... Jú, tá tú hevur timburmenn, so ligg í songini til tú verður frískur...

Hvør skal næstu ferð setast í bláa stólin?
Eg havi hugsað um ein vágbing, sum eitur Heri Mortensen. Hann hevur gjørt eitt ótrúligt arbeiðið fyri bæði svimjingina og kappróðurin í Vági. Heri er ein sonn eldsál, sum hevur gjørt eitt megnar arbeiði fyri tey ungu í Vági.



# Á Filipsoyggjunum verður smátt til stórt

Seks limir úr Evangeliihúsinum í Havn fara um vikuskiftið á vitjan á Filipsoyggjunum. Talan er um eina hjálpar-, menningar- og missiónsferð til eitt av heimsins fátæku londum. Í viðførinum hava tey eisini við sær gleðiboðskapin, sum kann geva hesum fólkum eina vón um eitt lív her á foldum og eitt ævigt lív



*Tey fyrireika seg til ta longu ferðina til Filipsoyggjarnar. Týskvøldið vóru teir seks føroyingarnir savnaðir, sum nú leggja ta longu leiðina eystureftir - f.v. Eyðun Miðberg, Hans Tausen, Rakul Petersen, Johannes Nilssen, Linda Petersen og Magni Thomsen*

TRÚBOÐAN
*Snorri Brend*

Eitt av flogførunum sum leygardagin fer at seta seg á flogvøllin í Manilla á Filipsoyggjunum hevur við sær eitt serstakt ferðalag. Talan er um seks limir úr samkomuni "Evangeliihúsinum" í Havn, sum tær næstu tvær vikurnar fara at vitja á ymsum støðum í økinum kring høvuðsstaðin Manilla.

- Hetta verður ein hjálpartúrur og ein menningartúr, men so sanniliga eisini ein missiónstúrur, sigur Eyðun Miðberg, ið er ein av stigtakarunum til hesa ferðina, sum varir fram til 18. november.

Samkoman hevur frammanundan sent út ein trúboðara, sum við millumbilum hevur vitjað á Filipsoyggjunum. Hann hevur longu fingið samband við bæði fólk og samkomur, og við hesi ferðini ynskja tey í Evangeliihúsinum at styrkja og útbyggja hetta góða sambandið.

Á ferðini fara teir seks føroyingar at vitja samkomur, fara at undirvísa í ymiskum, m.a. í Fyrstuhjálp, eins og tey fara at vitja í fongslum.

Tey gjalda sjálvi nógv tann størsta partin av ferðini til Filipsoyggjarnar, men hava haraftrat fingið stuðul frá fleiri fyritøkum í Føroyum. Hesin stuðulin fer í størstan mun nýtast sum hjálp til tey fátækastu, m.a. heimleys børn.



*Sambandið við Filipsoyggjarnar er sprottið úr sambandinum við hjúnini Josa og Steva Dulwich. Hon er føroysk og hevði áður Reinert til eftirnavn*

### Smátt kann gerast stórt

Hetta er kortini ikki fyrstu ferð at fólk úr Evangeliihúsinum fara á slíka ferðir í onnur lond. Fyri tveimum árum síðani var Eyðun sjálvur trettindi við á eini ferð í Serbia.

- Tá ein fer til onnur lond í slíkum ørindum, sær ein rættiliga skjótt neyðina hjá fólki. Vit í Føroyum hava almikið av øllum og ongin hevur orsøk at klaga um nakað.

- Í Serbia sóu vit, at sjálvt ein lítil stuðul frá okkum kann hjálpa einum hópi av menniskjum í neyð, bæði andaliga og sosialt. Tað arbeiðið ynskja vit at halda fram við, eins og vit ynskja at boða teimum gleðiboðskapin um eitt lív saman við Jesusi her á foldum og í Himmalinum, sigur hann.

### Frá orði til gerning

Tað var fyri tveimum árum síðani, at fólk í samkomuni "Evangeliihúsinum" tóku stig til "Team-missión", hvørs høvuðsmenn eru Eyðun Miðberg og Hans Tausen. Endamálið við hesum er fyrst og fremst at venja fólk við at fara út í missión. Í hesum arbeiðinum verður dentur lagdur á at læra limirnar í samkomuni í, hvat missión er. Hetta verður gjørt við undirvísing og við praktiskum arbeiði.

Byrjanin til hetta nýggja virksemið hendi stutt sagt við samanfallandi áhugamálum - ella samanfallandi kallan frá Gudi. Leiðarin í samkomuni, Dánjal á Dul Jacobsen fekk einaferð, hann vitjaði eina andaliga ráðstevnu í Danmark eitt ítøkiligt kunnskaparorð frá Gudi um at samkoman skuldi venda eygunum meiri úteftir í heimin.

Um nøkulunda somu tíð hevði samkoman bjóðað Steve Dulwich og familjuni heim til Føroyar at vitja. Alt tað, sum Steve tá talaði um var fult í tráð við ta kallið til missión, sum onnur í samkomuni høvdu fingið. Tí var eingin ivi: Vit ynskja at senda trúboðarar út í missión!

Og hví ikki senda Steve avstað, tá tey nú kortini høvdu hann millum sín?! Sum sagt so gjørt, og í dag arbeiðir hann í ymsum londum - m.a. í Serbia, Onglandi og á Filipsoyggjunum.

At tað júst gjørdist Steve sum varð sendur tú, er heldur ikki tilvild. Hann er nevniliga giftur við Josu, ið er dóttir Agnar Reinert, ein av góðu stuðlunum í samkomuni, sum nú eisini er fluttur til Danmarkar. Tey búgva øll í Danmark, hagani Steve ger styttri og longri ferðir til ymisk lond fyri at fylgja arbeiðinum upp.

Fyri tveimum árum síðani vóru 13 fólk í ymsum aldrum úr Evangeliihúsinum á vitjan í Serbia saman við Steve. Sambandið við Serbia er í dag útbygt enn meiri, tí í løtuni eru hjúnini Jórun og Kalle Jacbosen úr Havn í býnum Becej, norðarlaga í Serbia og arbeiða. Tey hava verið har í tveir mánaðir og skulu vera ein slakan mánað aftrat.

### Trý sløg av hjálp

Umfram tað vanliga viðførið hava hesir seks føroyingar eisini onnur ting við sær til ferðina. Talan er jú um eina hjálpar-, menningar- og missiónstúr, og tí verður dentur lagdur á at fremja hesi trý hugtøkini í gerningi.

Á Filipsoyggjunum er stórt fátækradømi. Ein partur av hjálpararbeiðinum verður tí at keypa mat og geva hann til tey, ið eru allar ringast fyri. Ætlanin er at býta mat út til familjur í teimum fátæku økjunum, eins og tey miða eftir at hjálpa heimleysum børnum.

Eitt annað ting í viðførinum er ætlanin um fleiri skeið í Fyrstuhjálp, sum verða fyriskipaði í næstum. Við í føroyska hópinum er Johannes Nilssen, sum hevur drúgvar royndir í hesi frálæruni, og sum m.a. hevur lokið sær útbúgving hjá danska Beredskabsstyrelsen.

Vanliga fólkið á Filipsoyggjunum hevur ikki ráð at nema sær slíkan kunnleika. Fyri at geva so mongum um gjørligt møguleikan at fáa hesa undirvísingina hevur ein boðið almenninginum at vera við. Skeiðið verður hildið í sjálvari kommunuhøllini, og tað skilst at áhugin fyri hesum hevur verið sera stórur, tí seinast tey fréttu høvdu omanfyri 100 fólk teknað seg til hetta almenna skeiðið hjá Johannesi.

At áhugin er so stórur kemst uttan iva av, at kunnleikin til tey mest elementeru tingini vantar. Av hesi orsøk koma mong illa fyri og fáa kanska varandi mein, tí tey ikki vita, hvussu tey skulu viðgerðar smærri og størri vanlukkur í gerandisdegnum.

Triðja tingið í viðførinum, og eisini tað týdningarmesta, er gleðiboðskapurin um Jesus. Ætlanin er at vitja fleiri samkomur, og at tala og syngja á hesum møtum. Á skránni er eisini vitjan í einum av fongslunum.

Eitt annað spennandi element á túrinum er ein vitjan hjá øðrum føroyingum í Filipsoyggjunum. Tey seinastu árini hava hjúnini Ása og Ólavur Jøkladal starvast sum trúboðarar í høvuðsstaðnum Manilla. Gongur sum ætlað verður tað til tað, at føroyska ferðalagið fer at steðga á hjá familjuni Jøkladal.



*Ein partur av hjálpini, sum ferðalagið hevur við sær, er til heimleys børn*